## Samtykt at samráðast

Meirilutin í bygdaráðnum í Hvannasunds kommunu hevur samtykt, at kommunan skal taka upp samráðingar við Klaksvíkar kommunu um møguliga at leggja tær báðar kommunurnar saman. Tað skrivar Norðlýsið á sínari heimasíðu. Men Pól Fuglø, bygdaráðslimur, sum er í meirilutanum, sigur við blaðið, at einki er hent í málinum síðani samtyktina, tí at borgarstjórin, Júst Poulsen, vil ikki fylgja samtyktini hjá meirilutanum.

## Havið skal kannast

Í august fara grønlendskir, danskir og svenskir granskarar at kanna havleiðirnar úti fyri Landnyrðingsgrønlandi. Tveir stórir ísbrótarar, tann svenski Boden og tann russiski Sovietsky Soyyuz skulu sigla ígjøgnum ísin, sum í støðum kann vera upp í fimm metrar tjúkkur. Høvuðsendamálið við kanningunum er at vita, hvussu langt norður grønlendski landgrunnurin røkkur, tí tað hevur týdning, tá mark einaferð skal ásetast kring Norðpólin.

# at undir føroyskt flagg




*- Hetta er triðja skipið í røðini, ið eg sum skipari fyri Team Beredskab Sp/f havi verið við til at flaggað undir føroyskt flagg í tvey ár. Hetta er ein heilt ótrúliga spennandi tíð hjá reiðarínum, okkum sum sigla við hesum skipum og hjá føroyskari frálandavinnu sum heild, sigur skiparin, Monrad Dalbúð á Prosper, Monrad Dalbúð. Maðurin á myndini er Vilhelm Nielsen, maskinmeistari*

skipanini, ið kann sløkkja velduga stórar eldar. Skipið kann eisini nýtast sum sleipibátur og hevur eitt seðlatrekk upp á 160 tons.

- Skipið er eisini útgjørt og hevur sertifikat til at taka sær av nógvum skipsbrotnum, um vit skuldu komið í eina slíka støðu.

Monrad sigur, at Prosper soleiðis kann taka 200 skipsbrotin fólk umborð á eitt slag av sjúkrahúsi.

- Eg havi verið við í hesi tilgongdini at flagga skipini til føroyskt flagg, og eg fari at sigla sum fastur skipari við hesum higartil størsta skipinum, sigur hann.

Prosper, sum í fyrsta lagi fer at sigla sum standby-skip, kann eisini loysa allar supply-uppgávur.

- Vit hava eitt afturdekk, sum er stívliga 600 fermetrar stórt. Hetta svarar til eitt rímiliga stórt grundøki til eini sethús, sigur skiparin.

Sosialurin hevur ikki fingið at vitað neyva prísin fyri Prosper, men sum skilst liggur hann um 50 miljónir krónur.

Skiparin er sera væl nøgdur við felagið Team Beredskab Sp/f, og hann heldur nógv um Torleif Mikkelsen sum »primus motor« í teirri tilgongd, sum verið hevur.

- Eg havi havt nógv við Torleif at gera seinastu árini, og eg haldi, at hann hevur verið rættiliga óførur og framsýggin, sigur Monrad.

### Áhugaverd tilgongd

Skiparin dylur ikki, at tað er FAS-skipanin í Føroyum, sum ger tað møguligt hjá føroyskum feløgum at gera seg galdandi í frálandavinnuni.

- Nú eru norskir skipaeigarar byrjaðir at hyggja higar til lands fyri síggja, hvussu føroyska skipanin er.

Monrad heldur, at kunnu føroyskir myndugleikar gera FAS-skipanina uppaftur betri og enn meira attraktiva, er hugsandi, at føroyski skipaflotin í frálandavinnuni fer at veksa uppaftur meira.

- Tað eru bara føroyingar, sum sigla við skipunum hjá Team Beredskab Sp/f og hesi bæði skipini, sum verða undir føroyskum flaggi aftrat, geva arbeiði til 42 føroyingar.

Hann sigur, at við føroysku altjóða skipaskrásetingini er skipanin hon, at sjálvt um kinverjar eru umborð á føroyskum skipum, skulu hesir rinda skatt í Føroyum.

- Samstarvið við norðmenn er sera gott, og vit hava fingið at vita, at føroysk sjófólk ikki á nakran hátt standa aftanfyri norsk sjófólk.

### Góðar umstøður

Monrad ivast onga løtu í, at frálandavirksemið, sum føroyingar nú sita á - og sum væntandi fer at mennast komandi árini, kann koma at fáa stóran týdning í eini møguligari føroyskari oljuvinnu.

- Vit hava góðar umstøður og góða hýru, eru 28 dagar úti og 28 dagar heima, og fáa hýru alla tíðina.

Skiparin sigur, at Team Beredskab Sp/f hevur havt nógvar uppgávur fyri Statoil, men okkurt av teimum báðum fyrru skipunum hevur eisini havt aðrar uppgávur.

- Supporter hevur arbeitt fast fyri Statoil, og tað fer Prosper eisini at gera - í hvussu er fyribils, sigur Monrad Dalbúð, skipari.



*Í gjár kom Prosper undir føroyskt flagg, og mánadagin kemur enn eitt frálandaskip, Ranger, undir føroyskt flagg*